## Greið tala úr Vestmanna

Atkvøðugreiðslan í Vestmanna gav tvey sera greið úrslit: Eitt sera stórt ja til samanlegging við Kvívík, og somuleiðis eitt stórt ja til eina samstarvseind við Streymoyar kommunu. Samstundis sum vestmenningar greiddu atkvøðu við løgtingsvalið leygardagin, skuldu teir taka støðu til tveir aðrar spurningar.
Til spurningin um samanlegging við Kvívík var sera greiður meiriluti millum vestmenningar: Ikki færri enn 722 søgdu ja og 59 nei, meðan 20 atkvøddu blankt.Hin spurningurin var um hvørja samstarvseind vestmenningar skulu í í framtíðini. Her søgdu teir greitt ja til Streymoyar kommunu við Havnini sum størsta býi. 481 ynsktu hesa loysnina, 169 fyri Vágum og 123 fyri Sundalagnum. So her vóru vestmenningar rættiliga samdir, tá tað snýr seg um framtíðina hjá kommunu síni.



# Eingin ivi um samanlegging við grannabygdina

*Valstýrið í Sandavági við Gutta Petersen (uttast høgrumegin) telja atkvøðuseðlarnar í sambandi við ætlaðu kommunusamanleggingina*



**Veljararnir í Sandavági og í Miðvági eru ikki í iva um, at kommunurnar skulu samstarva enn meiri í framtíðini**

FÓLKAATKVØÐA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Miðvág/Sandavág:** Saman við løgtingsvalinum skuldu veljararnir í báðum bygdunum taka støðu til ein spurning, hvørt kommunurnar skuldu fara undir ítøkiligt samstarv í framtíðini.

Í eina tíð frammanundan høvdu umboð fyri bæði kommunustýrini tosað saman um, hvussu eitt slíkt samstarv kundi verið skipað í framtíðini.

Vikuna undan valinum var ein kunnandi fundur hildin, har greitt frá hesi ætlanini og har fólk høvdu møguleika at seta spurningar til borgarstjórarnar báðar og onnur í panelinum.

Hóast fundurin var væl undirtikin av fólki, so skiltist á teimum, at tey ikki vóru vorðin so nógv klókari av hesum fundinum.



*Sjúrður Poulsen er spentur eftir at fáa úrslitini frá løgtingsvalinum til høldar. Honum við lið stendur formaðurin í valstýrinum, Torfinn Jacobsen*

Tað var sum ein segði: - Vit vistu lítið frammanundan, men eru nú vorðin meiri forvirrað!

Hetta hevði kortini ikki ávirkan á úrslitið av atkvøðugreiðsluni. 80% av øllum søgdu ja til samanlegging.

### Ítøkilig ætlan

Á kunnandi fundinum undan atkvøðugreiðsluni varð spurt eftir, hvat tað í roynd og veru var sum tey skuldu til atkvøðugreiðslu um – tað er: hvussu kemur spurningurin at ljóða.

Á atkvøðugreiðsluni leygardagin skuldu tey so í fyrsta lagi greiða atkvøðu fyri nýggjum løgtingi, men eisini taka støðu til ein spurning, sum var hesin:

“Taka tygum undir við at bygdaráðini í Miðvági og Sandavági fara undir eina ítøkiliga ætlan um samanlegging av hesum báðum kommununum?” – Ja ella nei!

Eftir at valstýrini í báðum bygdunum høvdu talt upp atkvøðurnar í sambandi við løgtingsvalið, fóru tey undir at telja upp hesa atkvøðugreiðsluna, sum eisini mundi hava stóran áhuga millum fólkið.

Í Miðvági fylgdi millum annað borgarstjórin, Napolion Magnussen við í, hvussu gekk við uppteljingini. Hann var týðiliga spentur eftir at vita, um bygdarfólkið var samt við honum og bygdaráði hansara í hesi avgerðini.

### Sannførandi ja

Eftir at valstýrini høvdu talt upp á báðum støðum, var eingin ivi um úrslitið: Lutfallið millum ja og nei var 4 til 1.

Í Sandavági var úrslitið munandi greiðari enn í grannabygdini: 416 søgdu ja, 70 nei og 12 atkvøddu blankt.

Úr Miðvági varð frammanundan sagt, at fólk mettu at tað vóru ov nógv ógreið viðurskifti í hesi samanleggingini og at fólk tí vóru í villareiði um, hvat tey skuldu siga.

Fólk á gøtuni væntaðu, at tað fór at vera rættiliga javnt millum báðar síðurnar, men tá til stykkis kom var kortini stórur meiriluti fyri at geva bygdaráðnum heimild til víðari samstarv við Sandavág.

Í Miðvági var úrslitið tí ikki eins sannførandi fyri ja-síðuna: Her vóru 427 fyri, men heili 222 ímóti og 9 vóru blankar.

Samanlagt gevur hetta 843 veljarar sum søgdu ja til samanleggingina, meðan tað vóru 292 sum søgdu nei.

Nú hava so bygdaráðini í báðum kommunum fingið eitt herðaklapp til at halda fram við at menna samstarvið teirra millum í fyrsta lagi, og síðani at byrja samráðingar við sørvingar.